# »Havið« – heimshav og heimahav

*Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókarverkið »Havið« eftir Boga Hansen, havfrøðing ið snýr seg um heimshøvini, men fyrst og fremst um tær føroysku havleiðirnar og nemur við samanhang millum hav, lív og dálking*




Bókarverkið »Havið« eftir Boga Hansen er í trimum pørtum, ið eru ætlaðir at vera ein samanhangandi heild, tó at hvør parturin kann væl vera lisin fyri seg. Fyrsti partur er almennur um hav og sjógv yvirhøvur, um heimshøvini, um ljós og ljóð, aldur, streym, sjóvarblanding og um sjóvarfallið og rákið í heimshøvunum. Høvundurin hugsar sær, at hesin partur kann vera grundarlag undir tí, sum annars verður skrivað í bókini.

Annar partur í bókini – og kanska tann mest upprunaligi, av tí at høvundurin hevur sjálvur verið uppií at gjørt nógvar av kanningunum, ið bókin byggir á – eru tær føroysku havleiðirnar, bæði innari og ytri, botnviðurskifti og streymar, tey ymisku sjósløgini norðanfyri, eystanfyri, vestanfyri og tað sermerkta við Hetlands- og Bankarennuni sunnanfyri, rák, lív og sjóvarhiti og broytingar eftir árstíðum og eftir áramáli. Eisini teir føroysku firðirnir vera viðgjørdir rættiliga gjølla, eitt nú lagbýti og rák á firðum, teir føroysku gáttarfirðirnir og súrevnistrotið, sum har kann vera.

Triði partur nemur við vistfrøðiligar spurningar, so sum fortreytir fyri gróðri í sjónum alment, um samanhang millum sjóvarblanding og gróður, um gróðurin í sjónum undir Føroyum serstakliga og um toskagýtingina á føroyskum havleiðum í tí sambandinum. Viðgjørd verða ymisk sløg av havdálkan og eitrandi evnum, hvussu tey eitrandi evnini flytast í sjónum og hvussu støðan er viðvíkjandi havdálkan á okkara leiðum. At enda viðger høvundurin veðurlagsbroytingarnar í farnari tíð, viðgerð sambandið millum veðurlag og hav, jørðina sum vaktstarhús og menniskjaskaptar veðurlagsbroytingar.

Bókin er ikki skrivað til nakran serligan bólk av fólki. Í Føroyum, her sum vit øll eru so nær knýtt at sjónum og liva av sjónum – í framtíðini kanska eisini av tí, sum er undir sjónum – átti ein sovorðin bók at havt almennan áhuga.

Innihaldið í bókini er hóskandi til undirvísing, eitt núi miðnámsskúlum og hægri skúlum, men bókin er soleiðis skrivað, at eisini aðrir skúlar, t.d. framhaldsdeild fólkaskúlans og fólkaskúlalærarar, kunnu brúka burtur úr bókini til undirvísingina ella sum stuðul í undirvísingini. Sjálvur hevur høvundurin brúkt partar í bókini í egnari undirvísing.

Í bókini er ein hópur av frágreiðandi grafiskum myndum, ið høvundurin hevur gjørt og sum gera bókina nógv léttari at lesa. Eisini er bókin prýdd við fotomyndum av dýrum plantum, ið høvundurin sjálvur hevur tikið, og sum sýna fagurleikan og margbroytni í sjónum við havsins botn. Aftast í bókini er eitt yvirlit við hentum leitorðum.

Repro-Z hevur tikið sær av repro, umbróting og prentumsiting. Bókin er 232 bls. til støddar og kostar 240 kr.



*Taxi eru í løtuni á ferð í Íslandi, so formurin skuldi verið eins góður og tann hjá fótbóltsleikarunum*

## Fótbóltsdansur á Kambsdali

*Samstundis, sum fótbóltslandskappingin endar, verður stórt dansitiltak í Ítróttahøllini á Kambsdali*

Jákup Mørk

Talan er um eitt afturvendandi tiltak, sum GÍ skipar fyri. Fyrst og fremst er tiltakið ætlað leikarunum, sum í summarhálvuni hava dystast móti hvørjum øðrum, soleiðis at hesir nú kunnu hittast undir øðrum umstøðum.

Undirtøkan millum leikararnar fyri tiltakinum hevur vanliga verið sera góð, og hava leikarar úr øllum eysturoyarfeløgunum leita sær til Kambsdal.

**Góð undirtøka**

Tað eru tó ikki bara leikarar, sum sleppa við a Kambsdal. Áskoðarar, og dansigestir annars eru eisini væl komnir, og eisini frá teirra síðu hevur undirtøkan verið góð. Sostatt vóru í fjør eini 800 fólk til dansin.

Orkestrið ta ferðina var Taxi, sum ivaleyst telist millum kendastu bólkar okkara, og soleiðis verður ætlandi eisini hesu ferð.

Taxi er annars í løtuni á konsertferð í Íslandi, so at formurin hjá teimum er í lagi, er einki at ivast í.

Alt í lat tykist vera lagt upp til ein hugnaligan enda á kappingarárinum, og í Gøtu vóna tey, at tiltakið aftur í ár fær góða undirtøku.

## Sætti gospelfestivalurin verður í vikuskiftinum í Norðurlandahúsinum

6. ár á rað, skipar Gospeltónleikafelag Føroya fyri Gospelfestivalinum og aftur í ár er Norðurlandahúsið karmur um festivalin, sum nú rættiliga hevur rótfest seg í Føroyum.

Endamáli hjá fyrireikarunum at hava henda festival er at menna og gera umstøðurnar hjá teimum, ið fáast við at syngja andaligan tónleik í Føroyum betri. At skapa eitt forum, har karmarnir eru optimalir.

Festivalurin í ár er einki undantak. Heili 13 bólkar, einstaklinga og kór fara at framføra andaligan tónleik í Norðurlandahúsinum 23. og 24. septembur og har verður eisini høvi at ogna sær fløgur og bøkur.

Upplýsingar um Gospeltónleikafelagið og Gospelfestivalin 2000 fáast eisini á heimasíðuni hjá Gospeltónleikafelagnum, www.gospelmusic.fo.

Atgongumerlir fáast í Norðurlandahúsinum, Kunningarstovuni í Havnn og Kiosk Vár í Saltangará.

Teir luttakandi á festivalinum í ár eru:

Siloakórið: Eitt kór, sum føroyingar flestir eru stoltir av. Kóri hevur ein greiðan og beinraknan boðskap og ferð at framføra mildan kórtónleik, júst sum vit kenna Siloakórið fyri. Eyðun á Lakjuni, sum stjórnar kórinum sigur at tey hava eisini fingið stuðul frá nøkrum sera dugnaligum tónleikarum. Siloakórið leggur fyri á festivalinum leygardagin.

Heini Lützen: Hann kenna vit øll. Hevur í mong ár veri sera virkin í Føroyska tónleikaheiminum og við fleiri fløguútgávum á baki. Hann fer fyri tað mesta at syngja lovsangir.

Eyðun Jacobsen: Eyðun Jacobsen, sum forrestin júst hevur hildi silvurbrúdleyp saman við konuni, er eisini eitt sera kent navn innan andaliga tónleikaheimin í Føroyum. Hann er júst komin heim av útlegd í Danmark, har hann hevur virkað sum lovsangsleigari í einari stórari kirkju í Ålborg. Hann hevur eisini fløguútgávu í ryggsekkinum og verður tað spennandi at hoyra hvat hann fer at borðreiða við
á festivalinum í ár.

Elsebeth Lindegaard: er 24 ár. hon er gift og er mamma at 2. dreingjum. Í juni var hon liðug við petagog útbúgvingina.

Síðan Elsebeth var barn hevur hon sungi nógv. Tá hon var 5 ár framførdi hon saman vi sistur síni í missiónshúsinum har hon búði og skjótt bleiv tað til fleiri og fleiri framførðslur. Tá systurin flutti heiman helt hon áfram einsamøll við at syngja. Hon hevur ein fastan klaverspælara við sær og á Gospelfestivalinum hevur hon kór og fult orkestur við sær.

Í 1995 gav Elisabeth út eina fløgu, sum kallaðist Dråben. Í novembur 99 kom so seinna fløgan sum kallast Hos Far. Og tað er serliga sangir frá hesi fløgu, sum Elsebeth fer at framføra á Gospelfestivalinum.

Fyri 7 árum síðani misti Elsebeth pápa sín eftir at hann hevði verið sjúkur í nógv ár. Nógvir av tekstunum, sum eru á fløguni "Hos Far" eru hetta at missa pápan. Tittulagi "Hos Far" ber eina vón um at sýggja pápan aftur í Himli.

Tónleikurin er poppur. Lægt tónleikin tilrættis hevur Jacob Grunnertoft, sum eisini verður á konsertini.

Elsebeth sigur at hon gleðir seg at koma til Føroya saman við orkestri sínum og vónar at nógv fólk koma til konsertinar í Norðurlandahúsinum 23. og 24. septembur.

Jan Honningdal: Hann er frá norra. Giftur og eigur 4 børn. Sangur hevur altíð ligi á hjartanum hjá Jan og hann ynskir at brúka sangin sum eitt amboð fyri Harran.

Gjøgnum tíðina hevur hann verið sera aktivur í andaliga arbeiðinum har hann hevur veri. Serliga er tað lovsangurin, sum liggur honum á hjarta og hevur hann givið fleiri fløgur út.

Á Gospelfestivalinum fer Jan at framføra við tónleikarum úr Føroyum. Hann og kona hansara gleða seg at koma til Føroya, og vit gleða okkum at hoyra tey.

Jesus Band: Er ein nýggjur bólkur úr Eysturoynni. Hesin spennandi bólkurin spælir fyri tað mesta blues og traditionellan rock.

Liquid Gravity: Poppur. Bólkurin er serliga kendur fyri sínar framførðslur á Vaglinum, har bólkurin hevur luttikið á útimøtum hjá samkomuni í Filadelfia. Bólkurin er eisini kendur fyri at vera ein sera yvirgivin lovsangsbólkur.

A2J: Ein dansibólkur í Kelduni í Skálafirði. Tey hava framført dansir, mime og drama síðani 1998.

Saltbrøður: „Poppur i en nøddeskal" Saltbrøður vóru við á seinasta Gospelfestivali og var framførðslan tá bergtakandi. Góður svingandi poppur, beinraknir tekstir og smílandi fólk á pallinum. Saltbrøður svingar og vit gleða okkum at hoyra teirra nýggja repertuire.

I Am:: Ein bólkur, sum so sanniliga ikki liggur á tí latu síðuni. I Am, sum m.a. hevur havt góðar plaseringar á „15 Tær Bestu" í Útvarpi Føroya og sum eisini hevur verið í Íslandi og spælt í summar, skal enda festivalin. I Am spælir reinan rock og má framførðslan hjá teimum eisini sigast at vera í serklassa.



# Møguleikar og avbjóðingar

Jan Müller

Oljutingið, sum varð stovnað herfyri, fer nú undir sítt fyrsta tiltak. Tað er eitt seminar, sum verður hildið á Føroya Handilsskúla 4. oktober. Saman við Handilsháskúlanum BI í Stavanger hevur nevndin í Oljutinginum sett saman eina skrá undir heitinum: Oljuvirksemi í Føroyum - møguleikar og avbjóðngar fyri vinnulív, almenna fyrisiting og útbúgvarstovnar við atliti til heilsu, trygd og umhvørvi. Fyri at kunna vera við í tiltøkum hjá Oljutinginum skal ein verða limur. Í løtuni hava rættiliga fitt av einstaklingum og virkjum teknað seg sum lim í felagnum, sum hevur til endamál at umrøða mál, ið hava tilknýti til eina komandi oljuvinnu.

Evnini, sum verða viðgjørd á Oljutinginum, eru m.a. Vónirnar til oljuvirksemi (Eyðun Elttør, oljumálaráðharri). Um oljulóggávuna (Anni á Hædd), Heilsa, trygd og umhvørvi - mannagongdir (Alex Buvik), Treytir fyri veitarar/krøv til samstarvsfelagar (John Inderhaug), Hvønn týdning fær hetta fyri føroyska vinnulívið (Jan Mortensen), Leikluturin hjá Undirvísingar- og mentamálastýrinum (Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður), Møguleikar fyri føleikaloysnum yvir stytri og longri tíð (Ragnar Magnussen, Føroya Handilsskúli), Um BI (Sigmund Rosnes, Handilsháskúlin BI Stavanger), Innihald, gjøgnumgongd og lestrarmyndil (Ingvil Smines Josdal, Handilsháskúlin BI, Stavanger). Eftir innleggini verður møguligt orðaskifti.



*Ingvør Nolsøe, forkvinna í Oljutinginum*

Tilmelding skal vera Vinnuhúsinum í hendi í seinasta lagi 2. oktober. Forkvinna fyri Oljutingið er Ingvør Nolsøe.


Sig okkum frá



Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

Galvaniseraðir viðfestisvognar



Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

MARKO´2000
SØLUSTEVNAN

Verður í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept - 01. okt.

Luttakarar:

Skósølan Gøtugjógv
P/F Jógvan Weihe
Curri
Flísan
Sp/f Sirri
MB Tours
Sp/f Inventartænastan
Profa
Benetton
Hon & Hann
Klæmint Petersen
Tutl
Millenium
Máling og Gólv
Shop Inn
Brøður Petersen
Húðrøkt v/Jørnu
Feðgar
ABS Transport
AD-Import
Súkkluhandilin í Líðini
Esmar Simonsen
JH Møblar
Com-Data
AWI Boats
Barnaútgerð
OilWind
Sp/f Hógv

Undirhald

Eivør Pálsdóttir
Sámal Ravnsfjall
Niels Midjord
Vísumenn úr Klaksvík
Rúna á Heygum
Ronnie Poulsen
Magni Christiansen

Magni Poulsen er frásøgumaður í samband við mótasýningarnar

SANSIR - TEL 355 355

http://marko.fsn.net
Marko Skrivstovan, Post Boks 172, FO-620 Runavík, Føroyar
Tel 22 22 50, Tel 22 22 51 Fax +298 44 95 35, e-mail: marko2000@ww6.fsn.net